| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**17. september 2009** | Blað nr.:<br>**8077**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **17. september 2009** **kl. 17.25**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 176/09-189/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Elin Lindenskov
Levi Mørk
Maria Hammer Olsen
Høgni Mikkelsen
Vagnur Johannesen
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Annfinn Brekkstein – í farloyvi
Jákup Símun Simonsen – ið var uttanlands

**LUTTÓK EISINI:**
Jóhan E. Simonsen
Jákup Egholm Hansen

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**178/09** **2009-1366**

**Annfinn Brekkstein hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Høgni Mikkelsen, eru loknar.

**Býráðið 17. september 2009:** Samtykt.

**179/09** **2009-0387**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 17. september 2009:** Tikið til eftirtektar.

- Nú fór Jan Christiansen

**180/09** **2009-2020**

**Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandi við at serstaka byggisamtyktin nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina var gjørd, var ein av fyritreytunum at eitt serstakt byggiráð skuldi setast.

Uppgávan hjá serstaka byggiráðnum er at vegleiða býráðið tá ið mál verða viðgjørd, ið komu undir fyriskipanir í serstøku byggisamtykt nr. 4, viðgera

spurningar, ið hava samband við útsjónd húsanna og hjálpa við leiðbeiningum til borgarar sum ætla at umvæla ognir í økinum.

Nevndin er mannað av einum umboði fyri Tórshavnar kommunu, umboði fyri Føroya Fornminnissavni og einum umboði fyri tey, ið búgva í økinum.
Byggisamtyktin var góðkend í 1973 og nevndin hevur helst virka øll árini. Men tey seinastu árini hevur nevndin ikki virka serliga væl og hetta hevur havt við sær týðandi seinkingar í viðgerini av málum, sum skulu ummælast av nevndini.

Tí verður skotið upp, at greinin um serstaka byggiráðið verður tikin burtur úr byggisamtyktini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at serstaka byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina verður broytt soleiðis at greinin um serstaka byggiráðið verður tikin burtur úr byggisamtyktini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 17. september 2009:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina soleiðis, at avvarðandi partar, fornminnisavnið og borgarar á Reyni verða hoyrdir um málið, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Kathrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Levi Mørk, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Høgni Mikkelsen.

- Nú kom Jan Christiansen,

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jógvan Arge, Levi Mørk, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Maria Hammer Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Halla Samuelsen og Høgni Mikkelsen.

181/09 **2009-1892**

**Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Kaldbak.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Um ársskifti 2005/2006 var samtykt at fara undir eina sethúsaútstykking við uml. 10 grundøkjum innan fyri dagstovnin í Kaldbak – við Krossá. Útstykkingin var liðug og sundurbýtt av Umhvørvisstovuni í juli 2008 (J.nr. 2005-1244).

Sera stórur hæddarmunur er á lendinum har og fyri at halda krøvini til hall á vegnum osv. var neyðugt er laga útstykkingina soleiðis, at stórur partur av henni liggur uttanfyri A-sethúsaøkið.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til regulering av serstøku byggisamtyktini fyri Kaldbak soleiðis, at A-sethúsaøkið við Krossá verður víðkað oman ímóti landsvegnum til Kaldbak.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir uppskotið dagf. 22.07.2009 til broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Kaldbak.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 17. september 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

182/09 **2008-1199**

**Endurskoðan av sáttmálanum við Fa. Bussferðir v/Hildur Jensdóttir.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Hildur Jensdóttir hevur gjørt vart við at sáttmálin, ið gjørdur var millum táverandi Velbastaðar kommunu og Fa. Bussferðir, eigur at verða endurskoðaður. Víst verður á, at fíggjarligu viðurskiftini ikki eru nøktandi – hetta tí tímaprísurin í sáttmálanum fyri busskoyring er ov lágur. Hildur Jensdóttir hevur á fundum við

umsitingina harumframt greitt frá, at túratalið og farleiðirnar eru munandi víðkað í mun til tað, sum sáttmálin upprunaliga legði upp fyri.

Sambært § 2, stk. 2 í sáttmálanum millum kommununa og Bussferðir frá 23. des. 2003 framgongur, at verða fortreytirnar fyri farleiðina munandi broyttar í sáttmálatíðini, t.d. at talið á ferðandi veksur so nógv, at tørvur verður á íløgu í buss/bussar, kann sáttmálin verða tikin upp til samráðingar.

Í § 6 stendur sáttmálin við, til hann av øðrum partinum verður sagdur upp skrivliga við 3 mánaðarliga ávarðing til tann 1. í einum mánaða. Í somu grein stendur eisini, at sáttmálin ikki kann fara úr gildi fyrr enn tann 1. juli 2010.

Grundað á omanfyri standandi hevur Hildur Jensdóttir víst á, at ynski er at samráðast við kommununa um at endurskoða verandi sáttmála.

Sum støðan er í dag, er væntandi at fleiri fara at nýta farleiðina. Tað finnast eingi heilt ítøkilig ferðafólkatøl, men vitandi um at fleiri fólk er flutt til Velbastað, og nógv fleiri børn nú ganga í skúlanum, má roknast við at enn fleiri fara at brúka farleiðina Tó kann staðfestast, at busskoyringin er økt munandi, og í hesum sambandi eru ynski frá m.ø. staðbundnu nevndini um at økja um túratalið. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 2005-0416 Mál viðv. Bussleiðini.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Árligi kostnaðurin fyri skúlabarnakoyring til Velbastað er uml. kr. 450.000,-, ið verður fíggjað av konto 18-5950. Samlaði árligi kostnaðurin fyri skúlabarnakoyring í Tórshavnar kommuna er kr. 2.237.543,-.

Og árligi kostnaðurin fyri býbusskoyring til Velbastað er uml. kr. 879.620,-.

Í verandi sáttmála er tímaprísurin kr. 289,- og henda upphædd er ikki lønandi fyri arbeiðstakaran. Kommunan letur uml. kr. 400-600,- um tíman fyri busskoyring í bussleiðini.

Ì tí nýggja sáttmálanum, sum er komin frá Fa. Bussferðir, er tímataksturin 475,- um tíman.

Umsitingin hevur biðið um uppskot um endurskoðaðan sáttmála frá Fa. Bussferðir. Nýggja uppskotið verður framlagt á fundinum. Orsøkin fyri at neyðugt er at taka støðu til ískoytis sáttmála er, at til verandi koyring krevst ein bussur afturat. Hetta viðførir, at Fa. Bussferðir mugu útvega sær ein nýggjan (brúktan) buss til endamálið.

Eftir sum kommunan hevur ynski um ikki at vera eigari av bussum, tá sáttmálaskeið eru liðin (pr. 1.juli 2010), er neyðugt at ein evt. avskriving av nýggjum útvegaðum bussi skal vera í tíðini, ið eftir er av sáttmálaskeiðinum. Hetta viðførir, at annar tímaprísur eftir øllum at døma verður galdandi vegna ta stuttu tíðina, ið eftir er til avskriving.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at góðkenna sáttmálan.

**Tekniska nevnd 2. apríl 2009:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kostnaðurin av meirnýtsluni er íroknað í umbønini um eykajáttan j.nr. 2009-0575, og vísandi til málið **2008-3983** Endurskoðan av fíggjarætlanini fyri 2009 við atliti til fíggjargongdina higartil, verða sparingar í 2009, eisini gjørdar á leiðini sum Fa. Bussferðir røkir.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2009:** Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri, kunnaði um støðuna.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2009:** Útsett.

**Býráðið 25. juni 2009:** Tikið av skrá.

**Ìskoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við Hildur Jensdóttir frá Bussferðir um endurskoðaða sáttmálan.

Bussferðir hevur fingið at vita at Tórshavnar kommuna undir núverandi umstøðum, ikki kann góðtaka ein tímatakst á kr. 475,00. Eftir eitt drúgvt samskifti er Bussferðir gingið við til, at tímataksturin fyri restina av tíðarskeiðinum verður kr. 400,00. Hesin tímatakstur viðførir ikki ein meirkostna fyri sáttmálan við Bussferðir í hesum fíggjarárinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við teknisku nevnd 2. apríl 2009.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen Elin Lindenskov Jógvan Arge og Jákup Símin Simonsen samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðið 17. september 2009:** Tikið av skrá

183/09 **2009-1888**

**Liðuggerð av uttanumøkjum á Jarnplássinum hjá Kommunalu Brennistøðini**

Kommunala brennistøðin fekk nýggja umhvørvisgóðkenning 29. mai 2008. So hvørt sum brennistøðin er víðkað og fleiri økir eru tikin í nýtslu, er góðkenningin víðkað til at umfata hesi økir.

Í góðkenningini eru settar treytir við m.a. liðuggerð av øllum brúksøkjum í sambandi við jarngoymsluna, so hvørt sum hesi eru atkomulig. Hetta fevnir um asfaltering ella stoyping av undirlagi á økjunum og dagføring av frárenningarskipanini og oljuskiljarum, umframt gerð av betongkanti, at halda møguligum lekum aftur á tangagoymsluni við evnum, ið verða tappaði av bilunum. Eisini skulu goymslurnar verjast móti regni og vindi. Sambært góðkenningini skuldu hesi viðurskifti verið fingin í rættlag 1. januar 2009.

Umhvørvisstovan var á fráboðaðari eftirlitsvitjan á brennistøðini 25. juni 2009. Eftirlitið varð framt við grundarlagi í umhvørvisgóðkenningini og treytunum í hesari.

Í sambandi við eftirlitsfrágreiðingina hevur kommunan fingið boð um at lúka treytirnar til brúksøkini beinanvegin ella í seinasta lagi 1. oktober 2009. Um ikki hetta er møguligt, verður kommunan biðin um at grundgeva fyri hesum.

Kommunan hevur 7. august 2009 sent Umhvørvisstovuni skriv, har boðað verður frá, at projekteringin av liðuggerðini av brúksøkjunum er sett í verk, og bíðað verður eftir kostnaðarmeting, fyri at viðgera málið politiskt. Í skrivinum verður biðið um, at onnur freist verður sett fyri liðuggerðini, tá projekteringin er komin longur ávegis, kostnaðarmeting er fingin og málið er viðgjørt politiskt.

Fyribils metingin av kostnaðinum fyri arbeiðið ljóðar á umleið 3,7 mió. kr. Hesa upphædd megnar brennistøðin ikki at bera av rakstrinum. Tí má íløgan antin fíggjast við eini eykajáttan ella flytast av aðrari játtan.

Íalt eru avsettar 8,025 mió. kr. á íløgujáttanini til renovatión í 2009, harav nýttar eru 0,467 mió. kr, sostatt eru 7,557 mió. eftir av íløgujáttanini. Játtanin er til útreiðslur til projektering av tyrvingarplássinum á Glyvursnesi og byrjan av arbeiðinum, m.a. í sambandi við gerð av móttøkuplássi til spillivatnsevju. Av tí at nógv er liðið av árinum og ognarviðurskiftir ikki eru avgreidd enn, verður ikki roknað við at brúka stórvegis av játtanini til nýggja tyrvingarplássið í ár.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til:

1. at prosjekt av liðugtgerð av uttanumøkjum á Jarnplássinum hjá Kommunalu Brennistøðini, verður gjørt

2. at umsitingin fær heimild at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión, og
3. at upp til kr. 3,7 mió av samlaðu íløgujáttanini til renovatión í 2009, verða játtaðar til útreiðslurnar av neyðugum arbeiðum, ið skulu gerast á Brennistøðini, fyri at lúka treytirnar frá Umhvørvisstovuni.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 25. august 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 17. september 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**184/09** **2004-2108**

**Heildarætlan fyri Tórshavnar kommunuskúla**.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært § 46, stk. 3, í løgtingslóg um fólkaskúlan er tað kommunustýrisins ábyrd, at hóskandi undirvísingarhøli eru tøk til undirvísingina.

Nýggja fólkaskúlalógin, sum kom í gildi í 1997, setur heilt øðrvísi krøv til m.a. skúlastovur, undirvísing og samstarv. Tí hevur verið/er neyðugt at endurskoða skúlabygningarnar í kommununi við atliti til at dagføra teir, soleiðis at teir lúka krøvini í nýggju fólkaskúlalógini, samstundis sum neyðugt er at vísa á nútíðarkrøv og hugsanir um framtíðar skúlabygging í høvuðsstaðnum.

**Tórshavnar Kommunuskúli**
Kommunuskúlin stóð liðugur í 1956 og var tann fyrsti av teimum stóru skúlunum, sum bygdir vóru í Føroyum. Tá varð hildið, at skúlatørvurin í kommununi var nøktaður langt fram í tíðina, men tað var tó heilt skjótt greitt, at Kommunuskúlin var alt ov lítil. Tískil gingu ikki nógv ár, til neyðugt varð at byggja nýggjar skúlar, bæði í vesturbýnum, eysturbýnum og í Hoyvík.

Men tíðin eldir og slítur, og skúlaskapur í dag setur heilt øðrvísi krøv til undirvísing enn fyri fimmti árum síðani. Tískil hava arbeiðsumstøðurnar og hølisviðurskiftini hjá næmingum og lærarum í Kommunuskúlanum ikki verið nóg góð seinastu árini. Plásstrotið hevur verið stórt og bygningarnir ótíðarhóskandi og uppslitnir.

Skúlaárið 2004/05 ganga uml. 600 næmingar í skúlanum. Lærararnir eru um 60.

**Nýggjur smábarnaskúli**

Arbeiðið at byggja ein nýggjan smábarnaskúla á økinum við Kongagøtu er komið væl áleiðis. Barakkin, sum var bygd fyrst í fimmtiárunum, og sum í nógv ár hevur hýst yngstu næmingunum er tikin niður, og nýggjur bygningur reistur í staðin.

Tað er Arkitektavirkið hjá Árna Winther, sum hevur teknað nýggja skúlan. Bygningur er í tveimum hæddum og er býttur upp í tríggjar eindir við einum glasbygningi, sum bindir eindirnar saman. Har er 6 vanligar skúlastovur umframt lærarastova, toilett, goymslurúm, gongsøki og onnur felagsrúm.

Skúlastovurnar eru innrættaðar fleksibult, t.v.s., at næmingarnir hava hvør sítt arbeiðspláss, men teir kunnu eisini arbeiða í bólkum ella sita í røðum. Somuleiðis er møguleiki at arbeiða í bólkum í felagshølunum. Stórur dentur er eisini lagdur á, at gott og trygt skal verða hjá næmingunum í fríkorterunum. Teir kunnu verða inni í felagsøkinum, í felags garðinum móti suðri ella á økinum millum bygningarnar.

Meðan bygt hevur verið, hava næmingarnir í 2. flokki gingið í skúla í Tilhaldinum í Tórsgøtu, meðan 1. flokkarnir hava gingið í skúla seinnapartin á degnum.
Nýggi skúlin skal hýsa 1. 2. og 3. flokki og skal standa klárur at taka í brúk í apríl 2005.

**Realskúlin**
Realskúlin er frá 1916 og hevur ongar serligar umvælingar fingið síðani. 7 skúlastovur eru á veghæddini og 3 á loftinum. Skúlastovurnar eru smáar, 3 eru 29,4 $m^2$ til støddar.

Realskúlabygningurin lýkur ongi krøv, sum verða sett nútíðarskúlaskapi, og saniteru viðurskiftini eru langt niðan fyri lágmarkið.

Samanumtikið kann sigast, at nógv er gjørt við sjálvan Kommunuskúlan seinastu árini, men har eru eisini aðrir bygningar: Gamli realskúlin og húsini hjá frk. Cohr, sum krevja stórar umvælingar.

**Tilmæli:**
Heitt verður á teknisku fyrisiting um at seta ein arbeiðsbólk at gera eina heildarætlan fyri allan skúlan, og at kr. 300.000 verða játtaðar av íløguætlanini 2004 á skúlaøkinum.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum at seta ein arbeiðsbólk og játta kr. 300.000 av íløguætlanini og senda málið til tekniska stjóran.
**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin fyri uttanduraøkið hevur gjørt uppskot til skipan av skúlaøkinum og økini beint uttanum skúlan. Kostnaðarmeting er gjørd fyri ætlanina.

| | |
|---|---|
| Skúlagarður | 800.000 kr. |
| Kongagøta | 400.000 kr. |

| | |
|---|---|
| Tórsgøta | 300.000 kr. |
| Frk. Cohr | 70.000 kr. |
| Grasagarður | 300.000 kr. |
| Óvæntað og mvg | 328.250 kr. |

Samlaða projektið verður mett at kosta umleið 2.173.875,00 kr.

**Heildarætlan fyri kommunuskúlan - Uttanduraøkið**
Í sambandi við samtyktina í mentamálanevndini 7. september 2004, viðvíkjandi gerð av heildarætlan fyri kommunuskúlan. Ein arbeiðsbólkur var settur: Hanus Joensen, skúlastjóri, Harald Bjørgvin, byggifrøðingur TK, og Michael Jacobæus, lendisarkitektur TK (formaður).

Av tí at Kommunuskúlin liggur mitt í býnum, eru møguleikarnir avmarkaðir fyri at økja um útiøki skúlans. Harumframt hevur Kommunuskúlin minst fermetrar pr. barn (5 m² pr. barn). Bólkurin hevur tí hugt at, hvørjir møguleikar eru fyri at brúka nakrar fermetrar, sum liggja móti markinum til Kommunuskúlan.
Tey tilskilaðu økini eru:

**Skúlagarðurin**
Framhald av verandi ætlan um at býta skúlagarðin sundur í minni eindir.
Kanna tørvin fyri innrætting av verandi skúlaøki.

**Økið uttan fyri nýggja skúlabygningin**
Fremja verandi uppskot til skipan av útiøki.

**Kongagøta**
Gera uppskot til brúk av Kongagøtu sum ein partur av útiøki skúlans. Forða fyri gjøgnumkoyring.

Parkering við Móttøkuhúsið.
Kanna møguleikar fyri anlegg í gøtuni og broytingar í vegprofil.

**Garðurin hjá frk. Cohr**
Kanna møguleikarnar fyri at urtagarðurin kann vera ein partur av útiøki skúlans. Treytir fyri brúk av urtagarðinum.

**Tróndargøta**
Skelting við básar til avseting av børnum.

**Tórsgøta**

Kanna møguleikar fyri at tryggja atgonguviðurskifti frá Tórsgøtu
Kanna møguleikarnar fyri betri avskiping av børnum
Útnytta økið framvið gl. Realskúlanum

**Uppskot til heildarætlan - Skúlagarðurin**

**Útiøkið kring nýggja skúlabygningin í Kongagøtu.**
Í sambandi við nýbygning í Kongagøtu var gjørt eitt uppskot til útiøki. Uppskotið er teknað inn í heildarætlanini við smærri broytingum.

**Sundurbýti av skúlagarðinum**
Í ár 2000 ynskti skúlin at býta skúlagarðin í minni eindir. Endamálið var at skapa rúm fyri ymiskum aktivitetum, skapa lívd og at gera útirúmið meira hugnaligt. Í samráð við frílendisdeildina, vórðu 2 av 4 plantukassum bygdir. Plantingin hevur útviklað seg væl, og sambært skúlanum hevur tað skapt eina positiva broyting í skúlagarðinum.
*2 teir síðstu plantingarnir eru teknaðir inn á uppskotið.*

**Innrætting av skúlagarði**
Sambært ætlanini er tann gamli skúlagarðurin býttur sundur í 4 minni eindir.
Bóltspæl uttan fyri fimleikarhøllina.
Eitt óinnrættað øki framman fyri høvuðsinngongdina.
Eitt øki við innrætting fyri spæl og uppihald framman fyri realskúlanum.
Eitt pláss framman fyri húsið hjá frk. Cohr.
Sambært avtalu við skúlan er ikki gjørt eitt nágreinligt uppskot til innrætting av skúlagarðinum. Sundurbýtið av skúlagarðinum er mett at hava størstan týdning í fyrstani. Uppskot til eina meira nágreiniliga innrætting má koma frá skúlanum so við og við.

Alt økið er tó at rokna sum skúlagarður, og skúlin kann frítt ráða yvir økinum.

**Kringumstøður**

**Kongagøta**
Skúlin ynskir at brúka Kongagøtu, millum skúlan og Grasagarð, sum partur av útiøkið fyri teimum minni børnunum í tí nýggja bygninginum. Vegurin skal framhaldandi vera avbyrgdur fyri ferðslu. Súkklur og gangandi tó undantikið.

Kongagøta hevur, sum hon liggur nú, umvæling fyri neyðini. Neyðugt er at umvæla kantsteinar og leggja nýtt asfalt á.

Ferðsluforðingar mugu setast upp móti Tórsgøtu og Tróndargøtu. Tróndargøtu megin eigur tó pláss at setast av til parkering til vørubilar o. líkn. Forðingarnar kunnu vera træplanting, bummar ella ein kombinatión sum letur fótgang-arar/súkklur passera.

Umvæling av koyribreyt
Umvæling av kantsteinum
Gera plantuhol við kantar
Uppseting av forðingum
Uppsetan av inventar (beinkir, borð o líkn.)
Fresing av asfalt, regulering av vegprofil og asfaltering

**Tórsgøta**
Í Tórsgøtu eru ymiskir aktivitetir við sambandi til skúlan. Avskipan av børnum, spæl í fríkorterum og aftaná skúlatíð. Ferðslan koyrir sum er ótarnað framvið inngongdini. Ein forðing et sett upp beint uttan fyri inngongdina.
Framvið realskúlanum er eitt øki, sum verður brúkt til spæl. Økið er tó ringt at sleppa til, og hæddarmunurin til gongubreytina er uml.1,5 m.

Skotið verður upp, at Tórsgøta, uttan fyri inngongdina, skal broytast til eitt øki fyri gangandi, hvar bilar sleppa at koyra ígjøgnum. Fyri at minka um ferðina, verður kantur ella bunga gjørd mótvegis vegbananum. Eitt p-pláss beint uttan fyri inngongdina verður tikið av.

Hegn verður sett upp framman fyri realskúlan, og pláss verður lagt av til gjøgnumgongd og spæl.

Inngongdin verður gjørd sum trappa og/ella rampa við gelendara.

**Tórsgøta**
    Broyting av vegprofil
    Beleggning av vegi
    Uppsetan av forðingum
    Uppsetan av ljós
    Súkkluparkering
    Bygging av trappu
    Uppseta hegn
    Gøta

**Urtagarðurin hjá frk. Cohr**
Skúlin hevur sett ynski fram um at fáa atgongd til urtagarðin hjá frk. Cohr í sambandi við undirvísing og í ein vissan mun til spæl.

Í ætlanini er tikið eitt minni øki burturav urtagarðinum til spælipláss. Økið verður hegnað frá urtagarðinum og verður soleiðis ein partur av skúlaøkinum. Á plássið verður lagt grús soleiðis at evt. spælireiðskapur kann setast upp seinni.

Atgongd verður til urtagarðin. Í urtagarðinum verða bygdar gøtur og smápláss við beinkjum til uppihald. Treytirnar fyri brúka urtagarðin verða avtalaðar við býargartnara.
**Anlegg í urtagarðinum hjá frk. Cohr**
    Steinseting av spæliplássi

Gerð av gøtu og smápláss
Uppseta hegn
Planting
Evt. trappa/rampa

**Grasagarður**
Grasagarður verður í ein vissan mun brúktur av skúlanæmingum í fríkorterunum. Tann parturin av Grasagarði, sum er beint undir Kongagøtu, er slitin. Serliga grasplenan, pavilliongin og grúsplássið.

Broytingarnar, sum eru tiknar við í uppskotinum, taka eisini hædd fyri, at Grasagarður gjøgnum summarhálvárið verður brúktur til ymisk almenn tiltøk. Nógv fólk eru ofta savnað í Grasagarði, og undirlagið tolir illa tann nógva gangin.

Fyri at klára tað dagliga slitið og fyri at skapa hóskandi karmar um almenn tiltøk, verður mælt til at leggja flísar kring pavilliongina og á núverandi grasplenu. Í skráarnar millum túnini verða bygdar trappur, sum eisini kunnu nýtast sum sitipláss.
Ein trappa, sum skapar samband millum Kongagøta og N. Winthersgøtu verður bygd millum pavilliongina og tannlæknastovuna.

**Anlegg í Grasagarði**
Flísapláss á grasplenu
Flísapláss kring pavilliongina
Sititrappur
Trappa til Kongagøtu
Umvæling av pavilliongbygningi
Ljós

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at nevndin góðkennir uppskotið. Mælt verður fíggjarnevndini til at játta peningin av løgukonti fyri 2007 umvegis teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina soleiðis:

432.440 kr. verða játtaðar av 90-1038 Fríðkan av býnum
818.125 kr. verða játtaðar av 90-1011 Vegir og kloakkir
935.000 kr. verða játtaðar av 90-1033 Skúlar.

**Mentamálanevndin 31. august 2006:** Samtykt at taka undir við heildarætlanini, og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 935.000,00 av konto 90-1033 Skúlar.

Tó heitir nevndin á teknisku nevnd at skipa p-økið í Kongagøtu sum av- og áskipanarpláss.

Eisini samtykt at beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanar-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. september 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at játta 432.440 kr av konto fyri fríðkan av býnum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at bíða við verkætlanini at skipa Kongagøtu sum av- og áskipingarpláss vísandi til, at ongir pengar eru settir av til hetta endamálið av íløgum fyri vegir.

**Tekniska nevnd 5. oktober 2006**: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum at játta kr. 818.125,00 av játtan fyri vegir og kloakkir, kto. 90-1011.

Nevndin samtykti eisini at beina málið viðv. av- og áskipingarplássi í ferðslu-nevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini, byggi- & býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Víst verður til skjal nr 2004-2108/14: Ferðslutekniskar viðmerkingar til uppskot um skipan av uttanumøki við Tórshavnar Kommunuskúla.

**Ferðslunevndin 24. oktober 2006:** Nevndin mælir til at taka undir við uppskoti, sambært skjali nr 2004-2108/14, soleiðis at eingin av- og áskipan verður í Kongagøtu, men at tveir p-básar verða gjørdir við pullertum til nýtslu til móttøkuhúsini hjá kommununi.

**Býráðið 26. oktober 2006:** Einmælt samtykt, samlaða játtanin er 2.185.565,00 kr.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur latið gjørt útbjóðingartilfar til verkætlanina grundað á uppskot til heildarætlan, og 5 bjóðandi luttóku í útbjóðingini. 4 boð eru komin inn.

| | |
|---|---|
| Articon | 1.581.863 kr. |
| Brockie | 1.774.168 kr. |
| Hjálpirót | 2.258.138 kr. |
| Við Sjógv | 2.275.183 kr. |

Articon hevur lægsta boð. Samlaðu fíggjartørvur verður 2.184.362 kr. Hjálagt er útrokning af fíggjartørvinum.

Umsitingin hevur prioriterað ætlanina soleiðis.
1. Útiøki við skúlan í Kongagøtu
2. Broyting av Kongagøtu
3. Broytingar í Grasagarði
4. Trafikloysn í Tórsgøtu

5. Innrætting av urtagarðinum hjá frk.Cohr.

Fyri at halda verkætlanina innafyri játtanina fellir pkt. 4 og 5 burtur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndin til at taka av lægsta tilboðnum og at játta kr. 2.184.362,00 við mvg, sambært útroknaða fíggjartørvinum, sí skjal nr. 2004-2108/62, og at beina málið í býráðið um teknisku nevnd, mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. august 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. september 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Michael Jacobæus kunnaði um málið.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av lægsta tilboðnum.

**Býráðið 17. september 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Nú fór Høgni Mikkelsen,

**185/09** **<u>2009-0362</u>**

**<u>Víðkan av rampuni undir havnarskrivstovuni.</u>**

Verandi rampa undir havnarskrivstovuni er bygd í 1975, og er hon 16 m breið og 11 metur long..

Í 2005 vóru smávegis umvælingar gjørdar á rampuna, umframt at botnurin bleiv tryggjaður móti undirmating.

Rampan hevur ein gamlan skaða í pelunum, sum eru undir sjóvarmálanum, sum tað einaferð verður neyðugt at umvæla.

Tað er oftani, at bæði Smyril og Norrøna eru í Havn samstundis, og liggur tá annað skipið undir havnarskrivstovuni og hitt undir farstøðini.

Tá tað er nógvur vindur av vestri ella útsynningi, vilja bæði skipini liggja undir havnarskrivstovuni, tí har er betur at koma til og frá á teimum ættunum.

**Rampan:**
Verandi rampa er 16 m breið. Hetta merkir, at Smyril bert fær annað portrið niður, men annars passar rampan rímiliga væl í hædd.

Tað er straks verri, tá Norrøna skal brúka rampuna, tí tá hongur hon einar 10-12 metrar útav. Hetta ger, at tað stendur nógv á rampuni, sum kann fáa skaða. Verandi rampa passar illa í hædd, og hetta ger tað sera trupult at koyra um rampuna, at avgreiðslan gongur sera seint og at botnurin á akførunum javnan tekur í.

Onnur ro-ro skip hava eisini trupult við at brúka rampuna, tí hon er ov smøl, og portrið kemur sostatt at hanga útav.
Til ber at bøta um hetta við at gera rampuna størri.

Um rampan verður breiðkað upp til 25 m, er hetta mett at kosta 7 mió.

Um rampan harumframt eisini verður longd fram við molanum við 6 m, er hetta mett at kosta tilsamans 13 mió.

Ein leinging av rampuni við 6 m ger at vit fáa eina nógv betur rampu, har øll rampan er nýggj, og at umstøðurnar at koyra í land eru nógv betur enn við tí minnu rampuni.

**Fendarar og pullartar:**
Verandi fendarar eru so lágir, at teir koma ikki upp til skipsfendararnar, sum eru ætlaðir at verða tað fyrsta sum tekur, tá skipið kemur til bryggju. Hetta ger, at skipini eru sera útsett fyri at fáa skaða, tá veðrið ikki er til vildar.

Tað ber til at bøta um hetta við at gera sama slag fendarar, sum teir ið eru undir farstøðini.

Tað er ikki heilt vist, hvussu stórur tann aftari pullarturin er, men mett verður, at hann kann brúkast, um nakað verður gjørt afturat honum.

Neyðugt er at gera ein nýggjan 150 ts pullart framman, sum er so høgur, at ferðslan á bryggjuni kann koyra undir.

Tann umtalaða byggingin av rampuni o.ø., skuldi verið væl egnað hjá øllum øðrum ro-ro skipum og ikki bara til verandi skipaferðslu við teirri avmarking, at dýpið er umleið 7 m

Kostnaðurin fyri pullart og fendarar er mettur til kr. 4,5 mió.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum**

Mælt verður til at gera skitsuprojekt og nýggja kostnaðarmeting til rampu, fendarar og pullartar, og at býraðið velur lim í bygginevndina.

**Havnarnevndin 9. februar 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Jákup Símun Simonsen og Vagnur Johannesen í bygginevndina.

**Ískoyti:**
Vísandi til reglugerð fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal byggi- og býarskipanarnevndin góðkenna byggilendi. Gjørt verður vart við, at breiðkanin av rampuni hevur ávirkan á kappróðrarøkið soleiðis, at pláss verður fyri einum báti minni á kappróðrarøkinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við samtyktini hjá Havnarnevndini 9. februar 2009.

**Dispositiónsuppskot:**
Bygginevndin mælir til at breiðka rampuna til 25 m, og at longja hana við 6 m fram við molanum. Hendan loysnin ger, at tað verður nógv betur at koyra í land, at øll rampan verður nýggj, og at tað eisini verður fult dýpi framman fyri rampuna.
At gera 2 stk. 150 tons pullartar.
At gera nýggjar fendarar, av sama slagi, sum undir farstøðini.

LBF kann projektera og bjóða arbeiðið út fyri ein fastan prís upp á kr. 460.000,-.
Harumframt eru teir sinnaðir at standa fyri projektuppfylgjing, byggileiðslu og fakeftirliti fyri kr. 365.000,-

Kostnaðarmetingin fyri arbeiðið, íroknað projektering, eftirlit og óvantað, er 17,5 mió.

**Tilmæli frá bygginevndini**:
Bygginevndin mælir til at taka undir við dispositiónsuppskotinum.

Eisini verður mælt til, at játta kr. 460.000,- til projektering.

**Havnarnevndin 18. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari licitatión, sum var hildin tann 26. august 2009:

Sea Star kr. 11.488.468
Articon kr. 11.341.367
J& K Petersen kr. 8.994.497
J& K Petersen (alternativ) kr. 7.867.562

Seinasta kostnaðarmetingin
frá LBF kr. 13.627.199

Kostnaður fyri projektering, eftirlit, trygging, príshækkingar og óvantað, er mettur til kr. 2.005.503,-

Í tilmælinum frá LBF, verður mælt til at taka av lægsta tilboðnum frá J&K Petersen upp á kr. 8.994.497,-.

**Tilmæli frá bygginevndini:** Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum frá J& K Petersen upp á kr. 8.994.497,-.
At taka av tilboðnum frá LBF at standa fyri projektuppfylging, byggileiðslu og fakeftirliti fyri kr. 365.000,-
At játta kr. 11. mió. av íløguætlanini hjá Tórshavnar havn 2009/2010, til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum.

**Havnarnevndin 7. september 2009:** Einmælt samtykt, at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 17. september 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

- Nú kom Høgni Mikkelsen

**186/09** **2008-3883**

**Frávik frá ”Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privat bústað” í sambandi útstykking 300 við Myllustjørn. (eisini nýtt mál).**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandi við útstykking 300 við Myllutjørn eru tað fleiri keyparar, sum hava latið grundstykkið innaftur, eftir at tey hava undirskrivað fyribilsskjeytið. Hesi ynskja at koma innaftur á grundstykkjalistan á tað plássið, tey vóru á, áðrenn tey fóru av. Ynski er grundað á, at tey meta stykkini vera ov dýr og meta seg ikki hava fingið røttu kunning frá kommununi.

Tá ið grundstykkjalistin varð broyttur í mars 2007 var ein meginregla fyri broytingini, at eingin skal flyta aftureftir á listanum. Koma hesi frá útstykking 300 innaftur, koma fleiri aðrir umsøkjarar á listanum at flyta aftureftir. Nakað av ónøgd kann væntast av hesum.

§ 13 um ”Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað” ásetur ”*Um tygum taka av tilboðnum um fasta ogn, verða tygum strikað/ur av øllum bíðilistum*”. Hetta verður umsitið soleiðis, at tá keyparar hava undirskrivað fyribils skjeyti, fara tey av grundstykkjalistanum.

Ein onnur umsitingarlig mannagongd er, at keyparar, sum lata stykkið innaftur, fáa ikki peningin fyri grundstykkið aftur, fyrr enn annar keypari er funnin.

Í útstykkingini 300 eru 63 stykkir. Av hesum eru 59 stykkir boðin út. 12 eru komin innaftur + eini 2 eru á veg. Tey 4 stykkini, sum ikki hava verið boðin út, verða eisini boðin út nú (hesi hava ikki verið boðin út orsakað av ivamáli við lendinum).

Fyrisitingin væntar ikki trupulleikar við at selja grundstykkini. Á bíðilistanum eru í løtuni 1787 umsøkjarar og í hesi tillutanini er kommunan komin til nr. 135.

Fyri at síðistillað bæði tey, sum hava latið innaftur og tey, sum møguliga fara at lata innaftur, verður frávikið galdandi fyri øll tey, sum higartil hava keypt grundstykkið í Útstykking 300. Frávikið verður ikki galdandi fyri tey, sum framyvir keypa grundstykkið.

**Tilmæli**
Vísandi til, at keyparar meta seg ikki hava fingið røttu kunning frá kommununi, mæla kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og deildarleiðarin fyri snarskivuna til, at Tórshavnar kommuna gevur keypararum av grundstykkjum í Útstykking 300, loyvi at koma uppá grundsstykkjalistan aftur á sama pláss sum tey høvdu áðrenn keypið, tá ið tey lata grundstykkið innaftur.

Eisini verður mælt til, at keypararnir fáa peningin aftur beinanvegin, sum tey hava goldið fyri stykkið, tá ið tey lata stykkið innaftur.

Tilmælini eru bara galdandi fyri tey, sum higartil hava keypt grundstykkir í Útstykking 300.

**Fíggjarnevndin 2. september 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og kunna øll á bíðilistanum.

**Býráðið 11. september 2008:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høgni Mikkelsen, býráðslimur biður um hetta málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Jan Christiansen samtykkja at bjóða nýggjum keyparum inn til verandi útstykking.

Ein minniluti: Leivur Hansen og Høgni Mikkelsen mælir til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevdina við áheitan um at taka núverandi útstykkingarætlan aftur og gera nýggja útstykking á økinum við 300 fermetrar stórum grundstykkjum.

**Ískoyti:**
Sambært kostnaðarmeting kemur Útstykkingin við Myllutjørn at kosta:

| **Tekstur** | **Kostnaður** | **Kostnaður pr. stykki** |
|---|---|---|
| Samlað upphædd uttan mvg | 36.015.561,89 | |
| Samlað upphædd við 25% mvg | 43.861.177,36 | 696.209,16 |
| Samlað upphædd við 6,25% mvg | 37.976.965,72 | 602.808,98 |

Um Eigarafelagið stendur sum byggiharri, skal eigarafelagið rinda 25% mvg, og kemur hvørt stykkið tá at kosta kr. 696.209,16. Hvør keypari kann fáa stuðul sambært niðanfyri standandi reglum:

Reglarnar eru:
Íalt kann verða søkt um stuðul uppá kr. 150.000 í meirvirðisgjaldi av arbeiðsløn. Fakturin skal útgreinast á tann hátt, at síggjast skal hvussu stórur partur er arbeiðsløn, og hvussu stórur partur er tilfar. Tó er tað so, at er lutfallið millum løn og tilfar soleiðis, at lønarparturin er **størri** enn tilfarsparturin, verður stuðul veittur við í mesta lagi helvtini av meirvirðisgjaldinum av arbeiðsløn og tilfari samanlagt, sí løgtingslóg nr. 58 frá 7. juni 2007 um stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði.

Men hetta merkir, at ”kvotan”, sum hvør keypari annars hevur til sítt stykkið, lækkar samsvarandi soleiðis at ein minni upphædd er eftir, tá ið tey fara at byggja sjálvt húsið í og við, at partur av kvotuni er brúkt til byggibúningina og grundina.

Um kommunan stendur sum byggiharri, verður kostnaður fyri hvørt stykkið kr. 602.808,98, umframt at hvør keypari varðveitir mvg-kvotuna á kr. 150.000 í og við at kommunan rindar 6,25% í mvg.

Kommunan hevði komið at lagt út til útlegg undir øllum umstøðum. Vandin er sjálvandi, at kommunan tekur ábyrgdina sum byggiharri, serliga í mun til stoyping av grundini.

Hesin vandi kann minkast við at kommunan ikki stoypir sokkul og ei heldur fínplanerar. Hetta merkir samstundis, at søluprísurin lækkar og at nýggjar samráðingar um arbeiðstøkuna mugu til í og við, at sokkulin aleina kostar umleið 6 mió. kr. Hetta er meira enn tey 15%, sum kommunan hevur loyvi til at regulera tað tilboðsupphæddina við sambært ABF 06. Í og við at sokkulin verður tikin burturúr verkætlanini, fáa keyparar størri møguleika fyri sjálvi at forma húsini. Prísurin fyri fínplaneringina verður kannaður í løtuni.

Um kommunan velur at vera byggiharri, má støða takast til sáttmálan. Lisitatiónin var 24. apríl 2008 og inn komu trý tilboð:

| | | |
|---|---|---|
| P/F J. & K. Petersen Contractors | kr. | 32.815.928,00 |
| P/F Articon | kr. | 31.232.841,93 |
| P/F Hansen & Jakobsen | kr. | 24.840.686,00 |

Tilboðini eru uttan mvg.

UP Verkfrøði spf hevur kannað tilboðini og mælir til samráðingarnar við P/F Hansen & Jakobsen, ið hevur lægsta boð áljóðandi kr. 24.840.686,00 + mvg.

Atlit má takast til fíggjarstøðuna hjá kommununi soleiðis at skilja, at kommunan ikki byggibúnar 63 stykkir og fær ikki selt meginpartin av stykkinum. Meginparturin av stykkunum eiga at vera seld, áðrenn avtala verður gjørd við arbeiðstakaran. Fyrr var vanligt at siga, at kommunan skuldi hava selt 60%, áðrenn byggibúningin fór í gongd. Hetta svarar til 38 stykkir. Mælt verður somuleiðis til, at keyparar gjalda 40% beinanvegin við undirskriving av fyribils skjeyti og rest tá ið endaligt skjeytið verður tinglýst.

Tórshavnar kommuna hevur ikki tøkan pening til útlegg. Verður kommunan byggiharri eigur tískil eitt byggilán (stuttfreista byggikredit) at útvegast til verkætlanina.

**Spurningarnir eru tískil:**

- Skal Tórshavnar kommuna vera byggiharri?
- Um kommunan gerst byggiharri, skal sokkul og fínplanering takast burturúr verkætlanini?
- Hvussu nógv grundstykkir skulu vera seld, áðrenn byggibúningin byrjar?
- Skal TK taka upp samráðingar við lægstbjóðandi og taka av, um partarnir verða samdir?
- Skal TK figgja verkætlanina við byggiláni?

Um ikki øll stykkir vera seld áðrenn byggibúningin er liðug, má kommunan leggja nakað út fyri írestandi stykkir.

Serstøk byggisamtykt er góðkend í landsstýrinum. Tó eigur fyrisitingin at taka viðurskiftini upp við Matrikulstovuna fyri eisini ”at taka teir í eið”, soleiðis at trupulleikar ikki stinga seg upp eftirfylgjandi.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og miðfyrisitingarstjórin mæla til:
1. at kommunan verður byggiharri
2. at sokkul og fínplanering verða tikið burturúr verkætlanini.
3. at kommunan skal hava selt 38 stykkir, áðrenn byggibúningin verður sett í verk (áðrenn sáttmáli verður skrivaður við arbeiðstakara).
4. at kommunan tekur upp samráðingar við lægstbjóðandi og um partarnir vera samdir, fær heimild at undirskriva sáttmála sambært omanfyristandandi.
5. at kommunan fær heimild at fíggja verkætlanina við byggiláni, og at hetta eisini er komið uppá pláss, áðrenn sáttmáli verður undurskrivaður.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2009:** Umsitingin er biðin at kanna matrikuleru viðurskifini og taka upp samráðingar við arbeiðtakaran.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal samtyktu at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum, tekniska stjóranum og miðfyrisitingarstjóranum tó so, at kommunan skal hava selt 45 stykkir áðrenn byggibúningin verður sett í verk, sambært punkt 3 í tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen mælir til at annulera lisitatiónina og at gera nýtt projekt, ið inniber vanlig grundstykkir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk og Maria Hammer Olsen.

Ímóti atkvøddu: Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
**Byggibúningin av útstykkingini Býlingur við túnum**

Gongdin í hesum málið hevur verið drúgv, og tykist hetta onkusvegna at vera sjálvstykjandi. Soleiðis at skilja, at longri tíð gongur til okkurt ítøkiligt hendir við byggibúningini, meira ivasamir gerast møguligir keyparar, og torførari tykist vera at selja tað tal av stykkjum, sum skal til fyri at byrja arbeiðið.

Býráðið samtykti tann 29. januar 2009, at 45 stykkir skulu vera seld áðrenn byggibúningin verður sett í verk.

Síðan hava stykkini verið boðin øllum á bíðilistanum, eins og tey hava verið boðin í fría almenna sølu í bløðunum tvær ferðir.

Nøkur eru tillutaði afturat, meðan onnur eru latin inn aftur. Í løtuni er støðan tann, at keyparar eru til 31 stykki, men bert fáa hava undirritað fyribils skeyti.

Sostatt vanta keyparar til 14 stykki afturat, og endalig avgreiðsla av søluni, áðrenn byggibúningin kann setast í verk sambært samtyktini frá januar 2009.

**Kostnaðarmeting og uppskot til leist**
Samlaði kostnaðurin fyri byggibúningina er mettur til kr. 31.147.506,51. Hvørt stykki er sostatt mett at kosta kr. 486.679,78.

Í øðrum útstykkingum hevur verið siðvenja at farið er undir arbeiðið, tá 40% av stykkjunum eru seld, og hevur kommunan kravt rentur av keyparum, ið hava ognað sær stykki eftir at arbeiðið er sett í verk, ella er liðugt.

Verða 26 stykki seld í 2009, og verður kravt at keyparar skulu rinda 50% av kostnaðinum við undirritan av fyribils skeyti, so verður samlaða inngjaldið til kommununa frá keyparum:

26 * kr. 486.679,78 *0,5 = <u>kr. 6.326.837</u>

Kr. mió. 6,3 verður mett nokk til at fíggja arbeiðið, ið kann gerast í 2009, meðan liðugtgerðin av byggibúningini má á íløguætlanina fyri 2010.

Treytað av at kostnaðarmetingin heldur, verður tørvurin á íløgum til byggibúningina í 2010 mettur til í mesta lagi 18.493.831,64, sum er kostnaðurin á liðugtgerð av hinum 38 stykkjunum.

Fyri hvørt grundstykki omanfyri 26, ið verður selt minkar tørvurin sjálvandi.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin, fíggjarleiðarin og leiðarin á snarskivuni mæla til:

1. at fyrisitingin fer undir at avgreiða skeyti og krevur 50% av mettta kostnaðinum við váttan av skeyti, og restina við handan av stykkinum
2. at kommunan setir arbeiðið í gongd, tá 26 stykki (40%) eru seld
3. at keyparar, ið koma afturat eftir at arbeiðið er sett í verk, ella liðugt, rinda kostnað, umframt rentu
4. at fyrisitingin avtalar við arbeiðstakaran at møgulig prísreglulering fellur burtur
5. at kostnaðurin av óseldu stykkjunum verður tikin við í íløguætlanina fyri 2010
6. at kommunan fær heimild at taka lán til neyðugu íløguna í 2010

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov og Jógvan Arge mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen mælir til at annulera lisitatiónina og at gera nýtt projekt, ið inniber vanlig grundstykkir.

**Býráðið 17. september 2009:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið í fíggjarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Levi Mørk, Høgni Mikkelsen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Greiddi ikki atkvøðu: Maria Hammer Olsen,

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 6 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Ímóti atkvøddu: Levi Mørk, Høgni Mikkelsen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Maria Hammer Olsen,

**187/09** **2007-0649**

**Kloakk í Skraddaragøtu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sum ein partur av reinsan av Hoydalsá er gerð av nýggjari kloakk við pumpubrunum við Skraddaragøtu. Hetta var ætlað at fíggja av rakstri, men vegna broytan av projektinum, bleiv hetta meira umfatandi og verður tað neyðugt at fáa hetta undir kloakkíløgur fyri 2009.

Biðið verður um at projektið kann verða boðið út í innbodnari lisitatión og at játtað verður kr. 150.000 til projektering og at gera klárt til útbjóðing.

Eisini verður biðið um at fáa broytt raðfestingina fyri kloakkíløgur fyri 2009, nú játtanin er skerd niður til kr. 7.230.000,- og tí ikki fíggjarorka er til ætlanina fyri 2009.

Umsitingin greiðir frá fíggjarligu viðurskiftunum innan avsettum íløgum fyri kloakkir í 2009. Víst verður annars til skjal nr. 2007-0649/1

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskotinum og játta nevndu upphædd og fíggja av íløgum fyri kloakkir í 2009 og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 14. mai 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd at játta kr. 150.000 til projektering og at bjóða arbeiðið út.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Projekteringin er liðug, og var arbeiðið boðið út til 7 arbeiðstakarar. Lisitatiónin var hildin tann 22. juni 2009, kl.11.00, á teknistovuni hjá Martin E. Leo. Inn komu 6 tilboð og hevði Articon lægsta tilboðið uppá kr. 1.265.683,08.

Tilboðini eru kannað, og verður av ráðgevanum mælt til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá Articon. Samlað kostnaðarmeting fyri arbeiði er kr. 1.636.927,80.

**Tekniska nevnd 3. september 2009:** Nevndin samtykti at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina at ávísa írestandi fígging.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur avsluttað ymiskt mál í samband við kloakkarbeiðir, sum eru liðug, og hevur í hesum sambandi gjørt eina samlaða sluttuppgerð fyri 8 kloakkverkætlanir, ið vísir eitt tøkt avlop á kr. 1.719.577, sum mælt verður til at nýta sum partur av fíggingini til kloakk í Skraddaragøtu. Hetta avlop er tó ikki nóg mikið til at nøkta fíggjartørvin til hesa og aðrar samtyktar kloakkverkætlanir,

sum eru í gerð í 2009, og resta kr. 362.000,- í. Hesa upphædd verður mælt til at flyta frá avlopi frá verkætlanunum Gøta í Dalinum Langa (kto 1011-90-11883) kr. 260.000,- og gøta til Hvítanes (kto 1011-90-11856) kr. 102.000. Verkætlanin Gøta í Dalinum Langa er liðug, og verkætlanin Gøta til Hvítanes kemur ikki víðari, av tí at semja ikki fæst við Landsverk um hesa gøtu framvið landsvegnum.

Víst verður í hesum sambandi til mál 2009-0427 – Status uppgerð fyri liðug arbeiði, sum eru fíggjað av íløgum 2009.

**<u>Sluttuppgerð fyri kloakkverkætlanir, fíggjartørvur 2009 og fíggjaruppskot 2009.</u>**

| Projekt nr. | | | Verkætlanir | Játtan | Bókað | Munur | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1011 | 90 | 11859 | Hoydalsá stig 3 | 320.000 | 533.667 | **-213.667** | Liðugt |
| 1011 | 90 | 11872 | Kloakk Rættará 2. stig | 287.000 | 0 | 287.000 | Liðugt |
| 1011 | 90 | 11874 | Reinsan av Hoydalsá 2. byggistig | 1.464.000 | 794.576 | 669.424 | Liðugt |
| 1011 | 90 | 11876 | Kloakk V.U.Hammershambsgøta – Grímskambansgøta | -496.000 | | **-496.000** | Liðugt |
| 1011 | 90 | 11892 | Reinsiverk við Djúpagilsvegin | 158.000 | 13.281 | 144.719 | Liðugt |
| 1011 | 90 | 11895 | Bøgøta - Vágsbotnur | 2.500.000 | 2.012.411 | 487.589 | Liðugt |
| 1011 | 90 | 11900 | Reinsiverk við Súpanarvík | 2.295.000 | 2.254.488 | 40.512 | Liðugt |
| 1011 | 90 | 11875 | Kloakk frá “ ìbúðir hjá Valbjørn Dalsgarð" | 1.001.000 | 151.292 | 800.000 | Næstan liðugt |
| | | | **Tøkt frá lidnum projektum,netto, at flyta til kloakkir 2009** | **7.529.000** | **5.759.715** | **1.719.577** | |
| | | | | | | | |
| **Projekt nr.** | | | **Játtanir higartil í 2009:** | **Játtan** | | | |
| 1011 | 90 | 11884 | Rættará niðari partur 1.stig | 3.200.000 | | | |
| 1011 | 90 | 11900 | Reinsiverk við Súpanarvík | 2.095.000 | | | |
| 1011 | 90 | 11902 | Kloakk í Skraddaragøtu | 150.000 | | | |
| | | | **Játtað higartil í 2009** | **5.445.000** | | | |
| 1011 | 90 | 11902 | Kloakk í Skraddaragøtu | 1.637.000 | | | |
| | | | **Fíggjartørvur íalt í 2009, írokna Skraddaragøtu** | **7.082.000** | | | |
| | | | | | | | |
| **Projekt nr.** | | | **Fígging av kloakkverkætlanum í 2009:** | | | | |
| | | | Tøkt á íløguætlanini fyri 2009 | 5.000.000 | | | |
| | | | Tøkt frá lidnum projektum,netto | 1.720.000 | | | |
| 1011 | 90 | 11883 | At flyta frá Gøta Dalurin Langi | 260.000 | | | Liðugt |
| 1011 | 90 | 11856 | At flyta frá Gøta til Hvítanes | 102.000 | | | Uppstøðga |
| | | | **Neyðug eyka játtan** | **7.082.000** | | | |

## Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. at lokað lidnu kloakkverkætlaninar sambært omanfyrinevnda yvirlitið
2. at flyta nettoavlopið av lidnu kloakkverkætlanum á kr. 1.719.577,- til kloakkverkætlanir í 2009
3. at takað av lægsta tilboðnum og játtað kr. 1.637.000 til verkætlanina kloakk í Skraddaragøtu
4. at flyta kr. 260.000 frá verkætlanini Gøta í Dalinum Langa (kto 1011-90-11883) til kloakk í Skraddaragøtu (kto 1011-90-11902)
5. at flyta kr. 102.000 frá verkætlanini Gøta til Hvítanes (kto 1011-90-11856) til kloakk í Skraddaragøtu (kto 1011-90-11902)
6. at beina málið í býráðið

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum tó so at punkt 5 verður tikið av reguleringskontoini.

**Býráðið 17. september 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**188/09** **<u>2009-1297</u>**

**<u>Fíggjarætlan 2010 hjá Kommunusamskipan Føroya</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Kommunusamskipan Føroya hevur sent uppskot til fíggjarætlan 2010 til góðkenningar.

**Fíggjarnevndin 9. september 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna uppskotið.

**Býráðið 17. september 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**189/09** **<u>2004-2542 (sí eisini mál nr. 2003-1537)</u>**

**<u>Vegurin Langi - við ognina hjá P/F Kaj Andreassen (matr. nr. 1æg, Hoyvík)</u>**

**Býráðið 17. september 2009:** Kunna var um málið.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Høgni Mikkelsen | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria Hammer Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |